Útbjóðing

# Bygdaleiðir

SL fara við hesum alment at bjóða út busskoyringina hjá Bygdaleiðum. SL hava sum samferðslueind, vegna landið, til uppgávu at samskipa sjóvegis og landvegis samferðslu, herundir planleggja, stýra og hava eftirlit við busskoyringini hjá landinum.

| **Útbjóðingin fevnir um Øki** | **Leið** |
|---|---|
| 1. Norðoyggjar | 500, 504, 506 |
| 2. Eysturoy | 440, 442, 480, 481 |
| 3. Eysturoy og Sundalagið | 200, 202, 204, 205 |
| 4. Streymoy | 100, 101 |
| 5. Vágar | 300 |
| 6. Sandoyggin | 600, 601 |
| 7. Suðuroyggin | 700, 702, 703, 704 |
| 8. Tórshavn-Leirvík | 400 |
| 9. Tórshavn-Flogvøllurin | Flogleiðin |

SL ætla fyrst í komandi árinum at bjóða út alla flogleiðina, tvs. eisini koyringina hjá teimum bussum, sum SL eiga og reka. Í hesum sambandi skulu SL brúka serligar mannagongdir á starvsfólkapolitiska økinum, sum krevja longri fyrireiking.

**Krøv**
- Útbjóðingin skal virka fyri, at SL fær fíggjarligar og tænastuligar fyrimunir í rakstrinum
- Sáttmálaskeiðið skal ætlandi byrja 1. januar 2002.
- Øll krøv og treytir verða ásett í útbjóðingartilfarinum.

**Tilboð**
Tilboð, merkt **Útbjóðing Bygdaleiðir**, skulu vera innkomin til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Fólkaflutningsdeildin
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

**í seinasta lagi 15. oktober 2001, kl. 12:00.**

SL skilar sær fullan rætt til at velja í millum innkomin tilboð. Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp. Sæð verður burtur frá tilboðum, sum ikki eru innkomin til tíðina.

Útbjóðingartilfar kann umbiðast hjá SL, tlf. 343000 ella t-post: pjt@ssl.fo Áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út, skulu kr. 1.000,- latast í depositum.

Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðara.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

Toll- og Skattstova Føroya
Eysturoyar Øki

# Starv á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávur:**
Álíkningar-/eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirviðisgjald, toll, skatt, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiðið er rættuliga sjálvstøðugt, tá tann ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir.

**Førleikakrøv:**
Tann, sum verður settur, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, bæði á stovninum og uttanfyri stovnin eitt nú á Handilsskúla v.m., og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjávlstøðugt.

**Vit kunnu bjóða** eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving. Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi, við flex-tíð.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum søtðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** kann fáast við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra á tlf. 448588.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Esyturoyar Øki
Postboks 225
Heiðavegur, FO-600 Saltangará

**innan 15. september 2001.**

**Um Stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 18 fólk.

Uppsetan og skipan av barrum

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tílíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650



Minst til!

MYNDAKAPPINGINA

Árins summarmynd 2001

- LES MEIRA Í MIKUDAGS-SOSIALINUM



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogur til spælistovuna í Kollafirði

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til dagrøktarskipanina í Kollafirði.

**Starvið**
fevnir m.a. um, at skapa tryggar og mennandi umstøður í spælistovuni fyri børn, dagrøktarar og foreldur, ið eru knýtt at økinum.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin hevur royndir innan dagstovnaøkið, kann arbeiða sjálvstøðugt, er virkin, røkin og hevur lætt við at samstarva.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. oktober 2001 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri í 11./13. lønarflokki.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elnu Árting, dagrøktarleiðara, tlf. 41 23 75/ 22 48 27, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, 410 Kollafjørður, í hendi í seinasta lagi 21. september 2001. Viðmerk umsóknina "Spælistovan"

SNARSKIVAN

*P/F Varðin í Gøtu er ein fyritøka í støðugari menning Fyritøkan eigur og rekur trý pelagisk fiskifør og hevur umleið 50 fólk í starvi. Í umsitingini starvast fast 2 fólk - stjórin og eitt skrivstovufólk, men felagið arbeiðir í løtuni við at menna skrivstovuna og søkir í tí sambandi eftir*

# Umsitingarleiðara/skrivara

Starvið er sera fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Uppgávur:**
- At verða við til saman við stjóranum og øðrum starvsfólki at uppbyggja eina vælvirkandi skrivstovu.
- At gera kvartals- og ársroknskap, gera fíggjarætlanir og útrokningar/framrokningar av ymsum slag og annars virka sum fíggjarligur ráðgevi hjá stjóra og nevnd í sambandi við framtíðar ætlanir.
- At leggja til rættis tilfar til fundir og virka sum skrivari á fundum við myndugleikar, fíggingarstovnar og onnur.
- At samskifta við teir marknaðir, sum selt verður til.
- At leggja til rættis dagligu uppgávurnar á skrivstovuni.
- At hava samskifti við peningastovnar um hendi.
- At hava samskifti við skipini um hendi.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú hevur royndir við skrivstovuarbeiði og ert sterkur á tí roknskaparliga/fíggjarliga økinum. Samstundis er tað eitt krav, at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini og annars hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti. Málsliga skalt tú duga væl at orða teg á føroyskum og enskum bæði í skrift og talu.

Sum persónur vænta vit, at tú ert ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú er fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Av tí at størsti parturin av dagliga samskiftinum er um skip og fiskivinnu, kunna umsøkjarar við kunnleika til hesa vinnu hava ávísan fyrimun.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt og í seinasta lagi hósdagin 20. september 2001 til: Virkisráðgeving Spf., Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigvør Laksá ella Símun Hammer á Virkisráðgeving, tlf. 449591. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðsku-/Umhvørvisskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo



Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

veng-føroyar

Plátulutir
Kúfangarir
Køleragittar
Kølarir
Lyktir
Síðuspegl
Beriarnar
Bensintangar



www.veng.dk

Veng Føroyar
Fo-335 Leynar

Telefon 42 17 67 Telefax 42 17 68 veng@post.olivant.fo



**VW PASSAT 1.9 TDI**
Árg jan.99, Km 72.000. Til sølu um hóskandi boð fæst. Alufelgur, el-rútar, el-spegl við hita, airbag CD/stereo.o.a. Boð undir kr.150.000,- hava ongan áhuga. .



**AUDI 100 2.5 TDI AVANT DIESEL**
Árg nov.92, Í sera góðum standi. Sóltak alufelgur, viðfestiskrók, radio/cas. o.a. . Kr. 165.000.



**AUDI 100 2.5 TDI LIMOSINE**
Árg okt.93, Diesel, í sera góðum standi. Sóltak alufelgur, radio/cas. o.a. . Kr. 170.000.



**AUDI 80 1.9 TDI DIESEL**
Árg jun.94, Í sera góðum standi, sóltak radio/cas. o.a.. Kr. 160.000.



**FORD GRANADA 2.8 CA.170 HK**
Árg 1983, Alufelgur, powerstýring, sentrallás Prísur: Gev eitt boð. .



**VOLVO 440 TDI DIESEL**
Árg jun.94, Í sera góðum standi. Kr. 130.000.

Úrvalsbilar Spf.
530 Fuglafjørður
tel. 444943 · fax 444638 · far. 217704

Allir bilar eru við 3 mánaðar garanti